

*Nervarnir vóru øgiligir hjá Fríðu Petersen, men hon vann at enda á hesum, og kundi tí feagnast um steypið, tá dysturin var av*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Nervarnir vóru øgiligir

Fyri fyrstu ferð, síðani hon kom upp í fremstu kvinnudeildina, kundi Fríða Petersen leygardagin fáa kensluna av, hvussu tað var at standa við einum steypi, og eftirfylgjandi kundi hon bara staðfesta, at tað var ein deilig kensla.

Men hon viðgekk eisini, at tað var eitt sindur truplari at spæla slíkan dyst, enn hon kanska hevði roknað við.

– Eg hevði veruligar nervar allan fyrra hálvleik. Tað plagar annars at vera nakað, sum hvørvur, tá dysturin er farin ígongd, men hesaferð tók tað mær langa tíð at koma ordiliga við í dystinum.

Og í mun til vanligu støðuna, so var dagurin kanska eisini eyka trupul hjá Fríðu. Agne Masenaite var nevnliga smáskadd, og tó at hon var við á beinkinum, so stóð tað greitt, at Fríða helst mátti standa allan dystin. Nakað sum Fríða eisini helt gjørdi uppgávuna tyngri.

– Tað sigur seg sjálvt. Ofta kann tað jú hjálpa nakað, um tú ført eina løtu á beinkinum, fyri síðani at koma aftur í dystin. Tað hevði eg ikki hesaferð, og tað gjørdi kanska uppgávuna enn truplari.

*Men eftir steðgin stóð tú teg munandi betri. Hvat var tað, sum tá hendi?*

– Tað er sjálvandi fyrst og fremst, at vit fáa verjuna at koyra betri. At eg so fái onkrar bjargingar, økir sjálvandi um sjálvsálitið, og so vóru nervarnir burturi, staðfesti havnargentan hjá Stjørnuni, áðrenn hon flennandi segði, at nú gekk leiðin altso til Klaksvíkar, har hon saman við liðfeløgunum skuldi feira steypasigurin.

**-jm**

Stjørnan-Neistin 22-17 (10-11):

# Favorittarnir máttu stríð



**Neistin spældi sín møguleika, men í seinasta var tað ikki nóg mikið. Stjørnan hevði klassan, sum skuldi til, tá mest stóð á, og so gjørdist talan um væntaða favorittsigurin**

COCA-COLA KAPPINGIN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast tað frá øllum síðum ljóðaði, at Stjørnan var stórfavorittur til kvinnufinaluna leygardagin, so fingu mongu áskoðararnir í longum løtum ein dyst, sum var nakað væl meira spennandi, enn roknað varð við.

Tí Neistin var als ikki komin í Høllina bara fyri at leggja seg skerflatar fyri spádda yvirvaldinum. Heldur ikki hóast byrjanin upp á dystin var alt annað enn góð fyri teirra viðkomandi.

Fyrstu løtuna sá nevnliga út til, at Neistin hevði ilt við at gloyma, at talan var um eina finalu. Hetta skilt soleiðis, at spælararnir tóktust vera fastlæstar av týdninginum av spælinum.

Hjá Stjørnuni tóktist hetta als ikki í sama mun gera um seg. Tær royndu at fáa ferðina á dystinu upp, og hóast tær ikki spældu upp til sítt allarbesta, so var tað bara Helena Dam Poulsen í Neista-málinum, sum forðaði fyri, at munurin gjørdist ov stórur longu fyrstu løtuna.

### Treiskar Neistakvinnur

Og spakuliga tóktust liðfelagarnir hjá Helneu so eisini at koma inn í dystin. Fyri tað nógva snaraði álopsspælið kring skotstyrkina hjá Simonu Petersen, men hon varð aloftast væl ansað, soleiðis at hon ikki ótarnað kundi senda skotini í kassan. Hinvegin riggaði verjan hjá Stjørnuni ikki so væl, tá aðrar enn Simona royndu seg. Fyri tað nógva stóðu spælararnir á hælunum, og tí fingu neistakvinnur fleiri ferðir møguleikan at koma ígjøgnum verjuna. Tað kastaði eisini hópin av brotskøstum av sær, og fyri atð mesta vorðu hesi eisini send trygt í meskarnar.

Men áloppsspælið hjá Neistanum innihelt tó ein stóran veikleika. Hóast ótrygga verjuspælið hjá Stjørnuni kostaði fleiri útvísingar, so megnaðu tær bláu als ikki at gera sær dælt av hesum. Við seks móti fimm megnaðu tær í alt ov lítlan mun at spæla verjuna tunna, og sálarliga tóktist hetta at møða spælararnar. Ikki minst eftir at Stjørnan økti til 8-6 við bara fýra útispælarum á vøllinum.

Men hóast tungu gongdina, so noktaði Neistin at geva seg. Stutt undan steðginum tóktist annars ganga tann vegin, at Stjørnan veruliga skuldi fara avstað. Spælið gleið nakað betri fram eftir vøllinum, men brádliga svaraði Neistin aftur. Seinastu minuttirnar undan steðginum broyttist støðan frá 10-8 til 10-11, og so var Neistin á odda, tá farið varð til hálvleiks.

### Verjan avgjørdi

Hálvleiksstøðan kundi kanska verið orsøk til, at fjáltur fór at koma á Stjørnuna, men so varð tó ikki.